


*Leygardagin var ein Iveco framsýning hjá Metek á Hjalla*

# Iveco framsýning hjá Metek

**Leygardagin 11. apríl var ein Iveco framsýning hjá Metek á Hjalla við øllum modellunum, sum fyritøkan umboðar í Føroyum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Lastbilafyritøkan Metek á Hjalla hevur fingið ein spildurnýggjan Iveco Trakker til landið sum testbil. Í hesum sambandi var eisini ein framsýning leygardagin í páskavikuni við øllum modellunum hjá Iveco, bæði vørubilum og lastbilum.

Testbilurin er ein Trakker 8x4 við 4-akslum við 32-tons wireheis og skiftilast. Hann er uppbygdur sum entreprenørbilur til tungan flutning. Ein slíkur bilur við skiftilast kann nýtast til nógv ymisk endamál, sum t.d. at koyra asfalt, grót og maskintransport umframt nógv ymiskt annað.

Bilurin hevur automatisk gir. Ongin girstong er at síggja og eingin kobling, bert nakrir knøttar á instrumentborðinum. Bilurin er lættur at koyra og at umgangast. Eisini hevur hann eina nýggja framkomna motorbremsuskipan, sum er sera effektiv. Trakker fæst við motorum frá 360 til 500 hk.

Petur L. Hansen, stjóri hjá Metek, sigur, at av tí at hesin bilurin er komin til føroya sum testbilur, er hann bíligur at keypa. Prísurin er 965.000 krónur, sum er umleið 200.000 krónur bíligari enn hann av røttum eigur at kosta. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Metek á Hjalla.



*Testbilurin er ein Trakker 8x4 við 4-akslum við 32-tons wireheis og skiftilast*



*Iveco hevur eitt stórt programm við last- og vørubilum*

